# Nýggjur formaður í føroyanevndini

*Tað verður Jan Petersen frá Sosialdemokratunum, ið skal sita í formanssessinum, tá forsætisráðharrin í morgin skal í samráð við føroyanevnd fólkatingsins*

*Eyðun Klakstein og John Johannessen Úr Keypmannahavn*

Tá danski forsætisráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen, í dag fer í samráð við 21 manna fólkatingsnevndina, ið fylgir ríkisrættarligu samráðingunum, verður formaðurin ikki til staðar.

Formaðurin í nevndini, Peter Duetoft, sum umboðar Centrum Demokratarnar á fólkatingið, hevur júst havt 50 ára føðingardag. Í hesum sambandi skal hann vera vertur til eina móttøku í norður Jútlandi.

Í staðin fyri Peter Duetoft, verður tað Jan Petersen, ið framsøgumaður hjá Sosialdemokratunum í Føroyamálum, sum skal leiða fundin.

Skrivarin hjá Peter Duetoft sigur, at móttøkan í norður Jútalandi er løgd til rættis fyri langari tíð síðani, og tí bar ikki til at flyta hana. Fundurin í føroyanevdini varð lagdur til rættis fyri fáum vikum síðani.



*Jan Petersen, fólkatingsmðaur fyri Javnaðarflokkin*

# Skiftistíðin framvegis avgerandi

*Millum mongu málini, ið skulu viðgerast á samráðingarfundinum í dag, verður skiftistíðin framvegis mett at vera tað mest avgerandi*

*Eyðun Klakstein og John Johannessen úr Keypmannahavn*

Tað er framvegis skiftistíðin, ið er týdningarmesta málið á dagsskránni fyri triðja samráðingarfundin um framtíðarstøðu Føroya. Fundurin verður settur í danska forsætismálaráðnum í dag klokkan 15 føroyska tíð.

Fundarskráin, landsstýrið og danska stjórnin eftir drúgt brævaskifti eru vorðin samd um, er í sjey punktum. Fyrst skal fundarskráin formelt góðkennast. Síðani skal landsstýrið leggja fram broytta samráðingarútspælið og greiða frá broytingunum í tí.

Tá alt hetta er gjørt byrja veruligu samráðingarnar. Ríkisborgararætturin stendur ovast á listanum fyri samráðingarnar. Føroyingar hava fyrr kravt, at føroyingar og danir skulu varðveita javnbjóðis rættindini hjá hvørjum øðrum.

Hetta krav hevur danska stjórnin ikki kunna góðtikið við teirri grundgeving, at hetta merkir dupultur ríkisborgararættur. Stjórnin hevur víst á, at føroyingar kunnu fáa somu rættindi sum aðrir norðurlendingar í Danmark.

Hetta tilmælið hava føroyingar nú tikið til eftirtektar. Landsstýrið hevur slept kravinum um javnbjóðis ríkisborgararætt og vísir á, at tað ber til at fáa nøktandi rættindi innan norðurlendsku karmarnar. Tí kann væntast, at hetta málið verður skjótt avgreitt.

### Skiftistíðin fer við nógvari tíð

Næsta málið, ið skal viðgerast, er samstarv innan umsiting og útinnan av myndugleika.

Hetta er eitt mál, ið kann taka heldur drúgva tíð á fundinum. Danir halda tað nevniliga vera ivasamt, um teir kunnu hjálpa føroyingum at umsita Føroyar, um landið gerst sjálvstøðugur statur.

Seinasti parturin punkti trý á dagsskránni, ið eru sjálvar samráðingarnar, er spurningurin um skiftistíðina. Tað er til hetta punktið, at landsstýrið hevur eitt nýtt samráðingarútspæl. Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa fatur á útspælinum, og tí ber ikki til at siga, hvat stendur í tí.

Samstundis sum landsstýrið fleiri ferðir hevur staðfest, at danska stjórnin í eini avtalu frá juni í 1998 hevur bundið seg til at vilja samráðast við føroyingar um eina lagaliga búskaparliga skiftisskipan, heldur stjórnin fast um, at føroyingar í mesta lagi fáa eina skiftistíð á fýra ár. Tí kann væntast, at hetta verður ein spurningur, ið fer at taka langa tíð at fáa avgreiddan undir samráðingunum.

Tá liðugt er at samráðast um búskaparligu skiftistíðina, skal støðan gerast upp, og síðani er ymiskt á skánni. Tá kann væntast, at landsstýrið fer at biðja um at fáa eina frágreiðing um hernaðarmál í Føroyum áðrenn fundurin endar.

### Uttanlandsnevndin er við

Áðrenn samráðingarnar skal danski forsætisráðharrin í samráð við 21 manna nevndina, fólkatingið hevur sett at fylgja samráðingunum.

Eisini landsstýrið hevur verið á fundi við løgtingsins uttanlandsnevnd, sum í gjár kom til Danmarkar saman við landsstýrinum. Uttanlandsnevndin skal fylgja samráðingunum, og eftir sjálvar samráðingarnar skal hon hava fund við landsstýrið, har landsstýrið fer at greiða frá samráðingunum, áðrenn fjølmiðlarnir sleppa fram at landsstýrinum. Uttanlandsnevndin verður tó ikki við inni í sjálvum samráðingarhølunum. Hon fær eitt rúm nærindis fundarhølunum, og er meiningin, at embætisfólk skulu ganga ímillum og kunna nevndina so hvørt.

Uttanlandsnevndin er ikki fullmannað, tí umboðini fyri Javnaðarflokkin og Sambandsflokkurin hava noktað at vera við. Hetta hevur formaðurin fyri uttanlandsnevndina, Hergeir Nielsen, tikið til eftirtektar.



Jóannes Eidesgaard úr Javnaðarflokkinum, sum er limur í uttanlandsnevndini, verður kortini staddur á Christiansborg, tá samráðingarnar fara fram. Hann skal nevniliga saman við hinum føroyska fólkatingsliminum, Óla Breckmann úr Fólkaflokkinum, vera við sum eygleiðari til fundirnar hjá donsku Føroyanevndini.

# Fullveldismálið komið í heimspressuna

*John Johannessen Úr Keypmannahavn*

Føroyska kravið um fullveldi er ein spurningur um æru.

Hetta er ein av niðurstøðunum í drúgvari grein um fullveldismálið í kenda týska tíðarritinum, Der Spiegel. Umboð fyri blaðið var í Føroyum fyri stuttum, tá danski uttanríkisráðharrin eisini vitjaði.

Der Spiegel hevur prátað við løgmann, danska uttanríkisráðharran, Høgna Hoydal og síðani við nakrar vanligar føroyingar. Hesir eru allir samdir um, at samráðingarfundurin seinnapartin í dag verður ógvuliga avgerandi fyri, hvat víðari hendir í fullveldismálinum.

Høgni Hoydal ger blaðnum greitt, at samráðingarnar væl kundu enda í dag, men at tað er spurningurin um skiftistíðina, sum er tann stóri knúturin.

Í hesum sambandi greiðir blaðið frá, at føroyingar fegnir vilja av við blokkstuðulin, men at vit ynskja, at hetta hendir yvir 15 ár. Men blokkstuðulin skal burtur. Tað eru bert biddarar og alkoholikarar, ið ynskja at fáa pening sendandi frá øðrum, slær ein av føroyingunum, blaðið hevur tosað við, fast.

Der Spiegel lýsir eisini samfelagsstøðuna í Føroyum og greiðir frá, hvussu samráðingarnar um fullveldi higartil hava gingist.




*Der Spigel viðger fullveldisspurningin í síðstu útgávuni*

## Viðmerking:

# Stig á leiðini til sjálvræði

*Fullveldi, samband ella »samstarv«*

### Orðapottur

Mong eru orðini, sum maðurin segði.

Tá ið tey øll verða latin út í stóra orðapottin, og potturin verður settur út á eldin og rørt verður í honum, so hann kann koma upp á kók uttan at kóka yvir, er ein spurningur, hvussu stór megi er í orðunum.

Tess fleiri eru av teimum innantómu og av teimum somu orðunum og ikki minst av teimum stóru orðunum, tess tynnri verður soðið og vandi verður fyri, at alt kókar upp í skúm og froðu, so eingin hevur møguleika at síggja veruleikan kláran og greiðan.

Og verður ov nógvur javningur gjørdur út á súpanina, verður vandi fyri, at alt endar í einum tjúkkum vavgreyti, sum eingin fær niðurum.

Hvat ið frægari ella verri er, kunnu vit so altíð fara at togast um.

### Fullveldi ella samband

Tað er ein partur av fullveldismálinum, sum ikki hevur verið lagdur nóg nógvur dentur á.

Higartil hevur spurningurin verið:
*skulu vit hava fullveldi*
ella
*skulu vit ikki hava fullveldi.*

Sagt við øðrum orðum, so kunnu vit bert velja millum fullveldi og samband. Tað má siga seg sjálvt, at hetta er at gera ein samansettan spurning nóg so einfaldan.

Men ein triði møguleiki er, og hann eitur: »samstarv«.

Vit hava í nøkur hundrað ár verið í ríkisfelagsskapi við Danmark, og hvussu hann hevur gagnað Føroyum og Danmørkini, kunnu vit altíð skifta orð um.

At felagsskapurin ikki kann halda fram í tí líki, hann hevur verið í, er eingin ivi um.

At tað ber til at arbeiða seg fram til eitt betri samstarv bæði politiskt og fíggjarliga og innan øll samfelagsøki, skal heldur eingin ivi vera um.

Sum samráðingarnar hava tikið seg upp higartil, so er grund til at bera ótta fyri, at vit verða kollrend av donsku samráðingarumboðunum og vit fara at tapa meiri fyri minni. Og vandi verður fyri, at nógv umrøddi blokkurin verður minkaður burtur í einki eftir stuttari skiftistíð, uttan at vit fáa annað í staðin fyri.

### »Samstarv«

Føroysku samráðingarumboðini eiga at dúva meira upp á eina samstarvsloysn, sum óivað bæði lættari og skjótari kann føra fram til nógv betri úrslit við nógv fleiri og størri møguleikum og perspektivi.

Stavnhaldið kann verða ein samstarvssáttmáli millum Føroya og Danmarkar, sum tveir javnbjóðis ríkispartar, har hvør parturin væl kann hava sína egnu grundlóg, um tað er neyðugt.

Og hvør parturin skal hava somu borgararættindi hvør hjá øðrum. Við einum tílíkum sáttmála verður alt at vinna og einki at tapa.

Í øðrum lagi kann Grønland koma upp í part sum triði javnbjóðis ríkisparturin í einum **sameindum norður atlantiskum ríkisfelagsskapi** stytt til **SNAR.**

Á enskum máli kann tað verða – ikki USA – men t.d. USNA – United States of the North Atlantic.

Við tí sannroynd í huga, at samstarv – fíggjarligt og politiskt – er tað, sum gagnar øllum mest, kundu vit í triðja lagi borðreitt so mikið væl, at onkur annar fekk hug at vera við í felagsskapinum – eitt nú Ísland – ja, hví ikki.

Tað eru tær óroyndu loysnirnar, sum bera í sær møguleikarnar til framburð.

Tílíkar ríkisfelagsskapir kenna vit til bæði í USA og í Canada. Tað letur til, at tað gongur hampuliga væl hjá teimum, bæði so og so. Og hvør av hesum felagsskapum hevur bert eitt umboð í ST. Og at hugsa sær, at teir hava megnað hetta í semju.

Vit kunnu eisini.

**Erling Simonsen**



# Skelkandi Amnesty-frágreiðing



*ÓRÆTTUR. Heimurin stendur at kalla í stað, tá ið talan er um mannarættindi. Amnesty International staðfestir í ársfrágreiðing, at enn sum áður verða fólk kring allan heimin órættvíst viðfarin, pínd og myrd*

HØGNI MOHR

Nýggjasta ársfrágreiðingin hjá altjóða mannarættindafelagsskapinum, Amnesty International, er ongin hugaligur lestnaður. Er frágreiðingin eftirfarandi, ber beinanvegin til at staðfesta, at lítil menning í mannakærleikanum hómast her um jarðarknøttin.

Stjórnir og myndugleikar í mongum londum bera seg framvegis ómentað og rátt at móti borgarum landanna. Píning, dráp og burturflytingar eru gerðandiskostur hjá mongum menniskjum.

Bæði stór og rík lond, sum eru fyrimyndir á summum økjum, tykjast ómetaliga afturhaldssinnað, tá ið talan er um grundleggjandi mannarættindi. Deyðarevsingar, sum í tali minna mest um hópdráp, verða framvegis framdar, og stórur munur verður gjørdur á fólki. Kvinnur, børn og tjóðarminnilutar í fleiri londum verða illa viðfarin, og lítil vón tykist vera fyri, at støðan fer at batna.

### Avrættingar og píning

Sambært frágreiðingina hjá Pierre Sané, aðalskrivara í Amnesty, verða brot á mannarættindini framd í 147 londum. Brotini eru umfatandi og skelkandi; sum vanligt, kundi ein verið freistaður at lagt afturat.

Í 72 londum ber til at avrætta fólk eftir landsins lóg, og skelkandi er, at í meiri enn helvtini av hesum londum er vandi fyri at verða avrættaður uttan at koma fyri rættin áðrenn. Píning og harðlig viðferð er gerðandiskostur í 132 londum. Eisini hvørva fólk javnan í 37 londum, har hildið verður, at myndugleikarnir standa aftanfyri.

### Afrikanskir brennideplar

Fátækasti heimsparturin, Afrika, helt í 1999 fram at kynda brennideplar. Amnesty leggur serligan dent á ræðuleikarnar í vesturafrikanska landinum, Sierra Leona, tá ið uppreistrarmenn í drápsrúsi myrdu og píndu vanligar borgarar í hópatali í høvuðsstaðnum, Freetown. Eisini verða afrikonsku londini Burundi, Kongo og Fólkaræðisliga Lýveldið Kongo bólkað undir stuttkomin lond, har fólk hava verið myrd frá hond. Í Afrika er púra vanligt, at byrsur og lógur verða latin børnum, sum verða noydd at stríðast fyri myndugleikar og uppreistrarherlið.

### Jagstraðir minnilutar

Suðuramerikonsku londini duga illa at fáa skipað viðurskifti í rættarhøpi. Løgregluharðskapur, píning og jagstran eru vanlig í at kalla øllum londunum har. Kolumbia fær sera vánalig ummæli frá Amnesty. Felagsskapurin fýlist á, at eingin verður drigin til svars fyri ræðuleikarnar, ið myndugleikarnir fremja. Herurin og hálvhernaðarligir bólkar standa sum ryssa yvir deyðum fyli, meðan lagt verður eftir fólkum, sum stríðast fyri mannarættindum, veit Amnesty at siga.

### Almenn hópdráp

Danski forsætisráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen, var herfyri á sjarmuferð í Kina. Og stórbrosandi javnaðarmaðurin varð undirdíktur í gávum frá kinversku myndugleikunum. Sigast kann, at tá ið talan er um mannarættindi, er lítið at flenna at. Í Kina hava í minsta lagi 18.000 deyðadømdir kinverskir borgarar verið undirdíktir í almennum skammbyrsuskotum og eiturinnspræningum seinastu 10 árini. Nógvir eru dømdir og avrættaðir sama dag sum dómurin er feldur. Serliga ódámligt er, at í Kina, sum Danmørk og onnur framkomin lond samstarva við, hevur tað týdning, nær á árinum tú verður dømdur.

Stundar tað til kinesiska nýttárið, ber til at verða deyðadømdur fyri rættiliga lítil brot á lógina. Og á nýttárinum eru hesar avrættingar (ofta hópavrættingar) ein partur av veitsluhaldinum.

### Kosovo og Kekenia

Funnist verður eisini at Evropa og vesturheiminum sum heild í frágreiðingini. Nógv verður gjørt burtur úr Kosovokreppuni og krígnum í Kekenia. Amnesty skírir atferð russara móti kekenum, bæði í Keknia og í Russlandi, skammleysa.

Í Kosovo vórðu ávarsom brot á mannarættindini framd móti serbum, sigoynarum og øðrum minnilutabólkum. Hesi brot vóru álvarsamast meðan NATO tveitt sínar bumbur í juni í fjør. Eisini verða evropeisk lond hartað fyri at hava gjørt mun á og jagstrað tey flóttafólk, sum spurdust burtur úr kreppuni.

### Avrættingar og harðskapur

Eingin Amnesty-frágreiðing uttan USA. Amerikumenn halda á at avrætta fólk fyri lógarbrot, ið hin dømdi framdi áðrenn hann var fyltur átjan. Í február varð Sean Sellers avrættaður í Oklahoma fyri morð, ið hann framdi, bert 16 ára gamal.

Í 1999 vórðu 98 fólk tikin av døgum við vælsignilsi frá amerikonsku rættarskipanini. Flestu teirra vóru svørt ella litt.

Amerikanska løgreglan og fongsulsverkið fer sambært Amnesty ofta illa við fongslaðum og fólki í varðhaldi, og eisini finnist felagsskapurin at, at fongslaðar kvinnur javnan eru fyri kynsligum ágangi og harðskapi.

Ársfrágreiðingin hjá Amnesty International er 294 síður og fæst á skrivstovuni hjá Amnesty fyri fimti krónur.

Δ


## Starvsfólk

***Søkt verður eftir starvsfólki til áhugavert og fjølbroytt starv í Grannskoðaradeldini í Føroya Banka***

***Starvið***
Arbeiðið fevnir um grannskoðan av:
- Ársroknskapum
- Perioduroknskapum
- Økisdeildum
- Avgreiðslustøðum bankans
- Stabsdeildum

***Førleikakrøv***
Tað er ein fyritreyt, at umsøkjarin hevur útbúgving og royndir frá peningastovni og/ella innan grannskoðan.

***Treytir***
Setanartreytirnar verða avtalaðar eftir royndum og førleika hjá umsøkjara.

Starvið skal setast skjótast tilber, men bíðað verður gjarna eftir rætta umsøkjaranum.

***Umsókn***
Skrivlig umsókn saman við viðkomandi skjølum verður í seinasta lagi 26. juni 2000 at senda

P/F Føroya Banka
Starvsfólkadeildini
Postboks 3048
110 Tórshavn

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Peturi Anfinni Johannesen, grannskoðaraleiðara á telefon 31 13 50 lokal 1225.

FØROYA BANKI